5 707265 100029 >

# Malaysia er best

Anja Kass Olsen av Nesi er farin ein gongutúr í miðbýnum í Havn. Anja hevur sonin Dánjal við sær. Tey eru farin at hugna sær í Havn í góðveðrinum.

Anja ætlar sær ikki at fara at ferðast uttanlanda í ár. Hon hevur fyri stuttum verið í Malaysia við familjuni, og tað var ein góður túrur.

– Eg ætli mær at ferðast í landinum. Vit fara á summarfestival, og tá ætla vit at sova á Viðareiði. Tað gleði eg meg til, sigur Anja.

Vit fingu Anju at velja fimm tey bestu ferðamálini í heiminum, og hennara meting var soleiðis:

1. New Zealand/Avstralia – Anja var au-pair í New Zealandi sum tannáringur
2. Malaysia – Tað var ein dreymatúrur. Har var so lekkurt, sigur Anja!
3. Kosta Rika – Har hevur Anja eisini verið við familjuni
4. Grikkaland – Søga og mentan...og gott veður
5. Bornholm Vit høvdu eina fína feriu á Bornholm, har foreldrini hjá mær og syskini hjá mær við børnum vóru við, sigur Anja






















